# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali

**Partur 16**



Trølla Omman hugsar og hugsar. Brádliga fær hon eitt hugskot. Aftan fyri skúrin var ein rúgva av gomlum hegnpelum.

- Trølla Pætur - kom og hjálp mær við at leggja allar hasar pelarnir framman fyri skúrin.

Trølla Pætur spyr, um tað ger nakran mun.

- Lurta eftir ommu og ger sum eg sigi.

Tey so gera – tey bera allar hegnpelarnir fram um skúrin og leggja teir í ein dunga. Tá tað er gjørt, tekur Trølla Omman eina svávuldós úr lummanum og roynir at tendra eld í tann niðasta pelan. Tað gongur ikki so skjótt, sum hon ynskir, men til endans kemur eldur í, og lítla løtu seinni logar. Tey fara síðani aftur um skúrin at bíða.

Niðri í bygdini kemur róp í. Ein smádrongur hevur sæð, at eldur er í skúrinum og róparar á politistarnar, sum júst tá eru í ferð við at leita í einum hoyggjhúsi eftir trøllinum.

- Tað er eldur í skúrinum undir Stóra Hamara, rópar smádrongurin.

Jógvan og Erling hyggja upp á hvønn annan.

- Hetta kann ikki verða rætt – og alt hetta hendir jólaaftan, físir Jógvan. Kom avstað Erling.

Teir halda avstað niðan brekkuna. Teir renna so skjótt, teir orka, men av tí at kavin er tjúkkur, mugu teir steðga av og á fyri at rinda møðina. Tá teir eru komnir niðan, síggja teir, at tað slett ikki er eldur í skúrinum, men í hegnpelunum, sum liggja framman fyri skúrin.

- Hvør ólukkan er tað, sum ger gjøldur burtur úr okkum, spyr Jógvan.

Júst tá loypir Trølla Omman fram.

- Tað eri eg, men eg geri ikki gjøldur burtur úr tykkum. Eg og Trølla Pætur havi ikki stolið jólapakkarnar, tað eru Stampi og Anthonio, sum eru tjóvarnir, og teir liggja inni í skúrinum her og sova. Jólamaðurin er eisini inni í skúrinum.

Jógvan og Erling hava hug at taka Trølla Ommuna, men hon ger seg klára at renna undan. Trølla Pætur kemur eisini undan skúrinum.

- Tað passar, sum omma sigur. Um tit fara inn í skúrin, so finna tit út av, um vit siga satt ella ósatt, sigur Trølla Pætur.

Sjálvt um Jógvan og Erling ivast í tí, sum trøllini siga, so fara teir yvir til skúrin. Í tí teir lata hurðina upp, vakna Stampi og Anthonio og stinga høvdini upp millum pakkarnir.

- Í lógarinnar navni - tit eru her við handtiknir, rópar Jógvan.

- Nei, tit skulu ikki fanga okkum, sigur Stampi og skal gera seg kláran at klintra upp gjøgnum holið í skúrinum, men júst tá reisir jólamaðurin seg upp og tekur í beinini hjá Stampa, so hann dettur.

Anthonio roynir at renna út millum Jógvan og Erling, men Jógvan stillar seg fyri, so at Anthonio rennur seg beint í búkin á Jógvan.

Jólamaðurin tekur í nakkan á Stampa og heldur, til Erling og Jógvan koma og taka hann.

*Puntur 22 til jólakalendaran*



